# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

### Minningarorð um

## Dánjal Hentze av Sandi



Havi við andakt sitið og lurtað eftir Jógvani Fríðrikssyni, saman við so mongum øðrum. Farið her at minnast mín góða vin og trímenning Dánjal Hentze, ið bleiv tikin heim bert 58 ára gamal.

Dánjal bleiv borðin í heim á Dronning Alexandrines Hospital 29. oktobur 1949. Hann var sonur Marsonnu Hentze, fødd Johannesen úr Funningi, og Martin Hentze av Sandi. Mammur ogara (okkara) vóru syskinabørn og allar bestu vinkonur, tí komu vit at vaksa upp í sera góðum vinarlag.

Um Dánjal er at siga, at hann var ein raskur og fittur maður. Sum børn komu vit nógv saman, tað bleiv vitja fleiri ferðir um vikuna. Kanska tað var ein onnur tíð, men hon var sera góð.

Einaferð minnist eg at Dánjal og Páll skuldu sova uppi hjá ogum, sum teir onkuntíð gjørdu, hetta man hava verið síðst í 50-unum, áðrenn vit høvdu fingið elektrist ljós. Tað var ein slík stákan við ledningum og battaríum, teir fingust við, fittir sum teir vóru í hondum, og so, áðrenn vit vistu av, var ljós á kjálkanum. Hetta og mangt annað minnist eg um Dánjal og beiggjar hansara.

Dánjal er farin heim, hann var ein bygdamynd, og stórur er saknurin hjá grannum og vinfólkunum, hugsi um teg Kartin góði, tit vóru so væl. Serliga fara mínir tankar til tykkum syskini hjá Dánjali. Jógvan, Páll og tykkum báðar Julionnu og Marin, og ikki at gloyma tykkum børnini ið hann var so góður við.

Dánjal er farin heim, har eingin pína og sorg er. Hvíli hann í friði. við djúpastu samkenslu.

**Anna Elisabeth**

# Familjan Mikkelsen vann bilin

Mikudagin 5. november handaði bilasølan Norðbil við Oyggjarvegin ein spildurnýggjan bil til familjuna Conny og Regin Mikkelsen í Hoyvík. Regin, sum var burturstaddur, og konan Conny saman við synunum Atla, Torbjørn og Sámal tóku ímóti bilinum.

Tað var ítróttarfelagið EB-Streymur sum burturlutaði bilin, ein Hyundai Sonata 2,0 GLSi, til eitt virði av 256.000 krónum. Lutaseðilin varð drigin leygarkvøldið 25. oktober.




*Birgir Dam Jacobsen, stjóri hjá Norðbil, handar bilin, ein Hyundai Sonata 2,0 GLSi, til Conny Mikkelsen og synirnar*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jógvan Godtfred Nielsen** andaðist 4. november, 71 ára gamal.

**Kada Heinesen**, ættað úr Kollafirði, andaðist á Heiminum við Vallalíð týsmorgunin, 89 ára gomul. Farið verður av Heiminum við Vallalíð fríggjadagin kl. 11.30 norður í kirkjuna í Tjørnuvík. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 14. Tey, sum vilja minnast Kadu, kunnu lata Heiminum við Vallalíð eina peningagávu konta í peningastovninum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara kæri pápi, verpápi og abbi

**Poul Bernt Rasmussen**
róptur danski Berint

andaðist á eldrasambýlinum Vesturskin á Toftum
týsmorgunin 4. november.
Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju
fríggjadagin 7. november kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Kaj, Óli, Egon, Eigil og Asta**

Tey, ið vilja minnast Berint, kunnu lata eina gávu
til eldrasambýlið Vesturskin á Toftum, konta í Føroya Banka.

**Dagurin**
**6. november. Leonhardus**, deyður umleið ár 570. Munkur og trúboðari í Fraklandi. Hann legði ikki í at vera valdur til biskup. Kundi øll lás og allar leinkjur at loysa og gjørdist verndarhalgimenni hjá lásasmiðum og fangum. Navnið er týskt og merkir leyva og harður.

